## Felagsformansvalið í Fiskimannafelagnum

Atkvøðuseðlarnir til formansvalið í Fiskimannafelagnum eru sendir út til tey, sum hava atkvøðurætt.

Hesi eru tey, sum hava goldið limagjald og/ella, sum eru mynstraði eftir sáttmálanum millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag í 2005 og/ella 2006.

Afturat hesum eru tey, sum hava goldið limagjald til Sjómannadeild FFs somu ár.

Um tað hendir seg, at fiskimaður ella sjómaður við valrætti ikki hevur fingið atkvøðuseðil, eigur viðkomandi at siga felagsskrivstovuni frá, og sendir hon so atkvøðuseðil.

Atkvøðuseðlarnir skulu vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi 30. januar.

**Føroya Fiskimannafelag**
Tlf. 31 15 69
Fax. 31 87 69
Teldupostur: fo-fisk@post.olivant.fo

Føroya Fiskimannafelag

## TANNARØKTARI

Kommunala barnatannarøktin á Tvøroyri søkir eftir tannarøktara at byrja 1. februar 2007. Tannarøktin umfatar børnini í Suðuroyar norðaru helvt frá 0-16 ár.

**Starvið**
Tannarøktarin skal gera fyribyrgjandi viðgerðir á tannlæknastovuni, og taka sær av upplýsandi/fyribyrgjandi arbeiði á skúlum og dagstovnum.

**Faklig førleikakrøv**
Útbúgving sum tannarøktari.
Fyrimunur at hava royndir frá kommunalari tannarøkt og fyribyrgjandi arbeiði.

**Persónlig førleikakrøv**
- Hava lætt við at tosa við børn og foreldur.
- Hava hug til at arbeiða við børnum.
- Duga væl at samstarva.
- Vera sjálvstøðugur í sínum arbeiði.

**Løn og setanartreytir**
Løn sambært avvarandi yrkisfelag og kommununa. Starvið er eitt nýupprættað hálvtíðarstarv við eini royndartíð uppá eitt ½ ár , orsakað av hølisviðurskiftunum.

**Gjøllari upplýsingar um starvið**
Kunnu seta seg í samband við Rutt Jensen klinikkstjóra tlf. 371216.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera Barnatannarøktini í hendi í seinasta lagi 19. jan. 2007.

Umsóknin skal sendast til:
**Kommunala Barnatannarøktin**
**800 Tvøroyri**

TVØROYRAR KOMMUNA

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## LÆRARI TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir einum lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðnum 29. mars – 27. juni 2007.

**Lærugreinir:**
støddfrøði í 2. og 3. flokki
tilevning og heimstaðarlæru í 1., 2. og 3. flokki
handarbeiði í 4. – 6. flokki
serundirvísing

**Aðrar uppgávur:**
flokslærari í 2. flokki

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett í staðin.

Starvið er fulltíðarstarv og er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlaleiðaran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. januar 2006 kl. 12.00.

**Kollafjarðar skúli**
**Botnavegur 2**
**FO-410 Kollafjørður**

Í Kollafjarðar skúla ganga í løtuni 144 næmingar í 1. til 9. flokki. 14 lærarar starvast í skúlanum. Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum. Vit arbeiða í 3 deildum við einum læraratoymi í hvørjari deild. Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

BÓKHALD | ROKNISKAP | MVG | DEBITOR/KREDITOR

Bókhaldsstovan
HJÁ REGIN KLARGAARD

NIELS WINTHERSG. 7 | TÓRSHAVN | TEL 21 81 96 | BHRK@POST.OLIVANT.FO

## Gøtu Kommuna

## KUNNGERÐ

Føstu almennu bygdaráðsfundirnir fyri 2007 hjá Gøtu bygdaráð eru ásettir at verða hesi mánakvøld :

| | |
|---|---|
| 29. januar | 26. februar |
| 26. mars | 30. apríl |
| 21. mai | 25. juni |
| 24. sept. | 29. okt. |
| 12. nov. | 26. nov. |

Allir fundirnir byrja kl. 19. Skráin verður lýst í vindeyganum í gonginum á kommunuskrivstovuni. Møguligar broytingar og/ ella eykafundir verða lýstir á sama stað.

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Tel 312973 · fax 318624

## Hjálparfólk til kantinuna

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til kantinuna, at byrja 29. januar 2007. Vit leggja dent á, at fólkið, ið sett verður er raskt, álítandi og nærlagt í sínum arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert von/vanur við køksarbeiði.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 15.00 og fríggjadag frá kl. 8.00 til 14.30, teir dagar tá skúlagongd er.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til kantinuleiðaran á tlf. 313771.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum skulu verða rektaranum í hendi í seinasta lagi 17. januar 2007.

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820